# Hava álit á Obama

Amerikanarar hava munandi betri álit á, at Barrack Obama, forseti, og tann demokratiski flokkurin eru førir fyri at leiða USA ígjøgnum fíggjarkreppuna, enn republikanararnir høvdu verið. Í einari kanning hjá CNN siga 58 prosent av teimum spurdu, at forsetin hevur ætlanir og arbeiðir miðvíst fyri at leiða tjóðina burtur úr kreppuni. Hini 42 prosentini halda ikki, at forsetin er á rættari leið, men kortini halda bara 24 prosent, at tær ætlaninar, sum republikanararnir hava lagt fram, høvdu gjørt størri mun. Kanningin hjá CNN vísir, at eydnast tað Obama at bjarga USA úr fíggjarkreppuni, verður hann sera væl umtóktur.



# Attenborough ræðist fólkavøksturin

Sir David Attenborough, sum tey flestu munnu kenna frá hansara mongu og frálíku sjónvarpssendingum úr náttúruni, heldur, at tað er neyðugt at avmarka fólkavøksturin á jørðini fyri at skerja trýstið á umhvørvið í heiminum. Sambært BBC skal hann hava sagt, at verandi fólkavøkstur er ræðandi, og hann mælir til tiltøk, sum skulu gera, at færri børn verða fødd. Bretski felagsskapurin Optimum Population Trust (OPT), ið hevur somu sjónarmið sum Sir David Attenborough, fegnast um orð hansara og sigur, at heimsins lond ásanna trupulkleikan við fólkavøkstrinum, men tora ikki at nema við hann.

torir at gera nakað við tað, tí teir eru bangnir fyri at missa kjarnuveljarar, staðfestir Tórbjørn Jacobsen.

### Kreppurnar stýra okkum

Næstformaðurin í Tjóðveldi vil nú hava nakrar munagóðar loysnir á borðið. Hann vísir á, at minnilutaálitið nú aftur er lagt fyri løgtingið til samtyktar.

- Loysnirnar, sum standa í álitinum, eru í grundini tær somu, sum Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, stóð á røðarapallinum og segði at man kann gera. Trupulleikin er, at hann bara sigur hvat man kann gera, men ikki hvat man fer at gera, slær Tórbjørn Jacobsen fast.

Fíggjarnevndarlimurin hjá Tjóðveldi fýlist á, at føroyingar vera verandi inni í eini kreppu alla tíðina, orsakað av at útreiðslurnar fáa loyvi at vaksa ótálmað.

- Vit kunnu ikki spola upp við 300 til 400 milliónum krónum til øktar útreiðslur um árið. Tað tolir samfelagið ikki. Skattalættarnir hjá farnu ABC-samgongu hava kostað inntøkusíðuni 380 til 400 milliónir um árið, og trupulleikin er, at ongar inntøkur verða settar í staðin, vísir Tórbjørn Jacobsen á.

Hann sóknast eisini eftir at føroyingar sjálvir leika næsta leikin í talvinum.

- Vit kunnu ikki fáa eitt vælferðarsamfelag, soleiðis sum tað verður stýrt í løtuni. Tann politiski viljin í Føroyum stýrir ongum. Tað eru tær afturvendandi kreppurnar og danskararnir, sum stýra okkum. Hetta er hent fyrr, og nú sita vit aftur og bíða eftir at kreppan noyðir okkum at gera nakað, staðfestir Tórbjørn Jacobsen.

# Kunnu vænta fall í búskapinum

**Óvissan er størri enn vanliga, men ábendingar eru, sambært greiningum niðanfyri, um at flestu størru vinnuligu bólkingar í búskapinum kunnu vænta fall ella í besta føri óbroytt ískoyti til BTÚ í leypandi prísum í 2009 og 2010, sigur Landsbanki Føroya m. a. í búskaparmeting, sum vit prenta niðanfyri**

BÚSKAPARMETING
*Landsbanki Føroya*

Í samband við fyrireiking av fíggjarlóg fyri 2010, hevur Landsbanki Føroya, eftir áheitan frá Fíggjarmálaráðnum, gjørt eina meting av búskaparstøðu og útlitum í føroyska búskapinum fyri 2009 og 2010, við denti á inntøkugrundarlagið hjá landskassanum. Um hesa tíðina á árinum hevur landsbankin vanliga eina meting av føroysku bruttotjóðarúrtøkuni komandi árið, men av serligum ávum hevur tað ikki verið møguligt at fingið dagført grundarlagið(1) til búskaparmyndilin.

Tískil verður í hesum føri einamest víst á indikatorar, sum mett verður fara at hava ávirkan á búskapargongdina í 2009 og 2010 og í hvønn mun hetta kann ávirka inntøkur landskassans.

### HEILDARMETING

Óvissan er størri enn vanliga, men ábendingar eru, sambært greiningum niðanfyri, um at flestu størru vinnuligu bólkingar í búskapinum kunnu vænta fall ella í besta føri óbroytt ískoyti til BTÚ í leypandi prísum í 2009 og 2010.

Tað, at landið kann væntast at fáa fall uppá útvið 1% í rakstrarútreislum í 2009 í mun til 2008, hóast hall uppá 500-600 mió kr, ger at minkingin verður størri enn fyrr væntað.

Metingin er tí, at BTÚ í leypandi prísum kann falla 3%-5% í 2009. Óvissan er sjálvandi størri um 2010, og metingin er tí, at fallið verður 1%-6% í mun til 2009.

Arbeiðsloysið var í miðal í 2008 1,3%. Við endan av mars 2009 er arbeiðsloysið 2,9% og Landsbankin metir, at arbeiðsloysið kann koma uppá 4% í miðal fyri árið 2009. Tað, at grannalondini eisini hava vaksandi arbeiðsloysi, kann gera tað truplari enn fyrr hjá føroyingum at fáa arbeiði uttanlands. Tað kann vera við til at økja um arbeiðsloysið. Nettotilgongdin til arbeiðsstyrkina (tey sum fáa arbeiðsaldur minus tey sum fáa pensjónsaldur) kann metast til árliga 150-200 sammett við 400-450 fyri 15-20 árum síðani. Trýstið á fráflyting og arbeiðsloysi er tí væl minni nú enn t.d. í kreppuni 1990- árunum.

Sum matvøruframleiðandi land skuldu Føroyar verið raktar mildari av altjóða búskaparkreppuni, men ábendingar eru um, at ávirkanin á BTÚ verður minst líka stór, sum í størru grannalondunum. Hetta hevur helst samband við vánaligu støðuna í fiskastovnunum, sum vit troyta, og við førda inntøku- og útreiðslupolitikkin, sum ger, at landið fær stórt hall og samstundis ikki megnar at halda rakstrarútreiðsluleguna. Húsarhaldini økja um uppsparingina og eru merkt av misáliti á útlitini. Brúk er tí fyri, at myndugleikarnir fremja átøk, sum kunnu styrkja um álitið hjá húsarhaldunum. Ein styrking av inntøku- og útreiðslupolitikkinum, sum minkar um hallið (tað skal helst verða minni enn ½ mia kr) fer helst bæði at bøta um kreditvirðið hjá landinum og álitið hjá húsarhaldunum.

### FØROYAR OG UMHEIMURIN Í BÚSKAPARKREPPUNI

Altjóða fíggjarkreppan merkist eisini í Føroyum, og eins og við flestu øðrum búskapum, hevur føroyski búskapurin helst verið fyri niðurgongd í framleiðsluni í 2008, ivaleyst verður tað sama galdandi í 2009, og helst eisini í 2010 við.

Nú so mikið stutt er frálíðið av 2009 og tað samstundis í tílíkum búskaparligum broytingarumstøðum er sera trupult at meta um framtíðina, verður landsbankans meting av útlitum í hesum føri í størri mun enn vanliga grundað á eina meting av føroyska mótstøðuførinum móti altjóða rákinum. Støði verður tískil í høvuðsheitum tikið til altjóða metingar av, hvussu stórt og drúgt fallið í framleiðsluni verður, umframt hvussu viðbrekin føroyski búskapurin er fyri altjóða afturgongdini.

Um allan heimin hava politiskir myndugleikar og tjóðbankar sett fíggjar- og pengapolitisk átøk í verk til tess at byrgja upp fyri einum búskaparligum skrædli. Heimsbúskapurin var fyri stórari afturgongd í 2008, og flestu altjóða búskaparstovnar meta, at gongdin verður tann sama meginpartin av 2009, tó eru útlit til stigvísa vend í móti endanum av 2009 og nakað inn í 2010.

Evropeiski Miðbankin (ECB) og IMF vænta minking í framleiðsluni í Evruøkinum í 2009 og at framleiðslan verður at kalla óbroytt í 2010. Evropeiski Miðbankin væntar minking á millum 3,2 og 2,2% í 2009 og vøkstur á millum -0,7 og 0,7% í 2010. Metingarnar hjá IMF eru, at framleiðslan í Evruøkinum minkar 3,2% í 2009 og at hon veksur 0,1% í 2010.

OECD væntar í meting um Evruøkið fall í framleiðsluni í 2009 á 4,1% og fall í 2010 á 0,3%.

Danska Búskaparráðið væntar minking í danska búskapinum í 2009 og 2010 á ávikavist 0,5 og 0,25%. OECD væntar hinvegin at danski búskapurin minkar 0,5% í 2009 og at hann veksur 0,9% í 2010.2 Danmarks Nationalbank roknar við minking á 1,1% í 2009 og vøkstur á 1% í 2010.

Føroyski búskapurin hevur í minni mun enn aðrir búskapir, ið føroyski búskapurin er tætt tengdur at, verið merktur av altjóða fíggjarkreppuni, og beinleiðis ávirkanin er tískil í størri mun tengd at búskaparligu afturgongdini í hesum búskapum. Versnandi útlit í umheiminum ávirka føroyska búskapin á fleiri ymsar hættir. Í fyrru hálvu av 2008 øktust m.a. altjóða orku- og matvøruprísir munandi fyri síðan í seinnu hálvu at falla aftur samstundis við búskaparligu niðurgongdini. Samstundis var altjóða rentustøðið fyri størri sveiggjum og var generelt fallandi í 2008 og 1. ársfjórðing av 2009, og útlit eru til enn lægri altjóða rentustøði restina av 2009. Ein ávirkan stavar sostatt frá lægri príslegu á innflutningsvørum, sum kann væntast at lækka komandi árini.

Føroysku peningastovnarnir eru í høvuðsheitum ávirkaðir av altjóða fíggjarkreppuni á tann hátt, at teirra fíggingarkostnaðir eru øktir. Hetta hevur í fyrsta lagi ávirkað teirra evni at læna pening út og at veita kredittir til húsarhald og vinnulív í Føroyum. Í øðrum lagi er frívirðið hjá føroyingum í virðisbrøvum og fastari ogn fallið munandi síðan á heysti 2007. Hetta, saman við stóru óvissuna um búskapargongdina komandi árini, ávirkar húsarhaldini á tann hátt, at tey minka um nýtsluna, og uppsparingin økist í mun til áður.

Og tá ið húsarhald í Føroyum og aðrastaðni eftir stuttari tíð fáa hug at økja uppsparingina munandi, ávirkar hetta fyrst og fremst lond, ið framleiða lutfalsliga meiri av nýtslu- og ídnaðarvørum, t.d. bilar og elektronikútbúnaður (drúgvar vørur og hágprísvørur).

Hugsandi er tískil, at matvøruframleiðandi lond ikki verða eins nógv ávirkað av minkandi eftirspurningi eftir teirra útflutningsvørum. Matvøruframleiðandi lond verða helst ávirkað fyrst og fremst á tann hátt, at matvøruprísir eru falnir nógv saman við rávøruprísum seinasta hálva árið. Væntandi fara útflutningsnøgdirnar fyri matvøruframleiðandi lond ikki at falla eins nógv og útflutningsnøgdirnar fyri ídnaðarlond.

Frágreiðingin kann heintast sum pdf-fíla á heimasíðu Landsbankans: www.landsbank.fo

